# Bilar

Nr. 225 • hósdagur • 21. november 2002 • 76. árg.

# Ferðafrásøgn úr Føroyum í Jaguar Magazine




*Jaguar Magazine fyri veturin 2002 hevur stóra ferðafrásøgn úr Føroyum*

**Fólk frá Jaguar Magazine, ið vóru her á vitjan í summar, hava gjørt stóra ferðafrásøgn frá túrinum. Nevnt verður um bilin hjá Svenning Johannesen í Havn, ið er tann einasti Jaguar bilur, sum er keyptur nýggjur til Føroya.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í seinastu útgávuni av Jaguar Magazine, ið kemur út fýra ferðir um árið, er stór ferðafrásøgn úr Føroyum. Blaðið verður sent út til Jaguar eigarar í ymiskum londum. Blaðmenn og myndamenn koyrdu í Føroyum í einum Jaguar S-Type í august mánaði. Í frásøgnini í blaðnum eru myndir, ið eru tiknar í Norðurlandahús-inum, á Hotel Føroyum og úr føroysku náttúruni. Eisini skriva teir um bilin hjá Svenning Johannesen, ið er einasti Jaguar bilur sum er keyptu nýggjur til Føroya.

### Trolaraskiparar koyrdu Jaguar

Tá vit spurdu Svenning Johannesen, hví hann keypti júst hendan bilin, sigur hann, at tá hann sum trolarskipari sigldi til Grimsby í 50-unum, koyrdu teir flestu trolaraskipararnir har í Jaguar. Síðan tá ynskti hann sær ein Jaguar. Tá Svenning seinni vitjaði aftur í Onglandi og sá hesar Jaguar bilarnar, setti hann sær fyri at keypa ein slíkan. Í 1978 gekk so dreymurin út, tá hann 21. august fekk ein nýggjan Jaguar XJ 4.2. Bilurin var dýrasti bilur í Føroyum tá. Hóast bilurin er 24 ára gamal, sær hann enn út sum nýggjur. Bilurin er ikki umlakkeraður, og dekkini blivu skift fyri 10 árum síðan, tá hann var í Aberdeen við bilinum.




*Bilførari undir vitjanini í 1997 var Jákup Alberg Berg*



*Tá Margretha drottning var á vitjan í 1997, koyrdi hon í bilinum hjá Svenning*




*Svenning Johannesen við 24 ára gamla Jaguar bilinum. Hóast bilurin ikki er umlakkeraður, sær hann út sum nýggjur*



# Russiska Lada verksmiðjan gott mót uppá framtíðina

**Í 1966 skrivaði russiska stjórnin sáttmála við italsku Fiat bilverksmiðjuna um framleiðslu av Fiat bilum uppá licens. 19. apríl 1970 koyrdu teir fyrstu bilarnir út av russisku Lada bilverksmiðjuni við Volgaánna**

BILVERKSMIÐJA
*Magnus Gunnarsson*



*Bæði russiski varaforsetin hjá Lada, Nicolaj Dybine, v.m. og stjórin í Fredericia Auto Import, Jørgen Hansen, vænta sær nóg av Lada í framtíðini. Nicolai Dybine stóð við samlibandið tá fyrstu Lada bilarnir blivu gjørdir í 1970*

Nú meira enn 30 ár eru liðin síðan fyrstu Lada 1200, sum vóru Fiat 124, ið vóru bygdir við loyvi frá Fiat, satsar russiska stjórnin veruliga uppá bilaídnaðin.

Herfyri var varastjórin á Lada bilverksmiðjuni, Nikolai Dybine, á vitjan í Danmark. Hann greiddi frá, at hann byrjaði at arbeiða við samlibandið á nýggju Lada verksmiðjuni í 1970. Hann arbeiddi seg upp til stjóra og síðan til varaforseta. Tað at Sovjetsamveldið datt sundur síðst í 80-unum førdi til stóran ótryggleika viðvíkjandi framtíðini hjá Lada. Øll 90-ini vóru ógvuliga trupul. Í 1993 bleiv Lada verksmiðjan til eitt privat partafelag, har starvsfólkini áttu størsta partin av partapenginum. Lada samstarvar í dag við General Motors og evropeiska menningargrunnin EBRD. Saman gera teir eina nýggja bilverksmiðju, sum eftir ætlan skal framleiða 75.000 bilar árliga.

Í Danmark fingu Lada bilarnir herfyri ein lemjandi dóm frá FDM. Teir høvdu nógv at finnast at. Serliga tað at teir mangladu alla ta útgerð, ið nútímans bilar hava sum standard í dag, eitt nú servostýring, ABS bremsur og airbags. Alt hetta verður nú broytt, sigur Nikolai Dybine. Í fyrsta umfari skulu tey modellini, ið eru á marknaðinum í dag, liva upp til evropeiskan standard bæði hvat viðvikur kvaliteti og trygd. Seinni koma heilt nýggj modell á marknaðin.

*Kelda: Tíðindaskriv frá Fredericia Auto Import A/S*




*Station-vognurin Lada 111*

# Scania gjørt lastbilar í 100 ár

**Í ár eru liðin hundrað ár síðan fyrsti Scania lastbilurin sá dagsins ljós. Eisini eru liðin 40 ár síðan Scania lastbilarnir komu til Danmarkar. Nakað seinni komu teir hendan vegin**

LASTBILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Scania hava gjørt lastbilar í 100 ár*



*Soleiðis fara Scania eXc lastbilarnir við longdum førarahúsi at verða innrættaðir í framtíðini*

Í 1902 framleiddi "Maskinfabriksaktiebolaget Scania" sín fyrsta lastbil. Talan var um ein lastbil við 2. syl., 12 hk og lastaði 1,5 tons. Hesi 100 árini hava teknisku framstiðini verið so ómetaliga stór bæði hvat viðvíkur støddini á bilunum, støddini á motorunum og hvat bilarnir lasta í dag. Scania Danmark bleiv stovnað í 1962, og seinni komu bilarnir hendan vegin. Scania og Volvo avloystu Bedford og Austin / Morris lastbilarnar í Føroyum. Teir fyrstu sum komu hendan vegin vóru Scania-Vabis.

## Opel Meriva



Nýggi familjubilurin hjá Opel, Meriva, hevur fingið designheiðursløn frá bretska verkfrøðingastovninum, Institut af Vehicle Engineers. Grundgevingin var at bilurin er gott dømi um nýhugsan, serliga við atliti til praktiska innrætting og modernað design.

*Kelda: Tíðindaskriv frá GM Danmark*

## Hyundai í Kina



Hyundai hava fingið loyvi til bilaframleiðslu í Beijing, har teir skulu framleiða Hyundai Sonata og Elantra. Ætlanin er at teir frá 2010 skulu framleiða hálva millión bilar árliga

*Kelda: Motor Magasinet*

## Infiniti M45



Luksusbilmerki hjá Nissan, Infiniti, kemur nú á marknaðin við einum nýggjum bili í USA. Talan er um M45, sum skal marknaðarførast við at senda ein stuttan film uppá 6 minuttir til 615.000 møguligar kundar í USA. Seinni verður bilurin at síggja á www.infiniti.com-M45

*Kelda: Motor Magasinet*